# Børnini spæla í góð- veðrinum

Heini S. Kristiansen

Hesi fittu børnini stóðu úti og hugnaðu sær í góðveðrinum. Hóast tey vóru eitt sindur flov, so stillaðu tey upp til myndatøku til æru fyri Sosialin.



*Børnini hugna sær úti*
*Mynd Jens Kr. Vang*



*Paul Nielsen er til arbeiðis í Vágstúni*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Snøgga bygningin

Seinnapartin í gjár var Paul Nielsen til arbeiðis í bygninginum, har Føroyabók heldur til.

Hann hevur verið arbeiðsleysur, men átekur sær smærri arbeiði fyri fólk, tá hann verður biðin um tað. Nú var hann so til arbeiðis í Vágstúni í Klaksvík.

Hann var í ferð við at banka rustin av einum parti av klædninginum, og skuldi síðani mála her.

– Tað eru nakrir dropar beint nú, men tað fer ikki at bila fyri málingina, sigur Paul Nielsen.

Hann væntar nógv fólk til Klaksvíkar leygardagin.